# Javnaðarlistin á Sandi

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Javnaðar Sýslu Javnaðarfelag hevði seinasta uppstillingarfundin hóskvøldið, og hevur flokkurin stillað upp fýra valevni til løgtingsvalið. Tey eru:

Eyðstein Dalsgaard, skipari, Skálavík
Tummas Frank Joensen, sjómaður, Skúvoy
Gerhard Lognberg, rørsmiður, Skopun
Birgir Mohr, sýslufulltrúi, Sandi

Javnaðarflokkurin á Sandi hevur í løtuni ikki umboðan á tingi. Men við undantaki av hesum valskeiðnum – og valsekiðinum 1978-1980, hevur flokkurin havt umboð á tingi síðani 1936, tá Jóan Petur Davidsen varð valdur á ting. Hann sat á tingi fram til sjeytiárini, tá Tórálvur Mohr Olsen varð valdur. Síðani 1988 hevur Jógvan Adolf Johannsen umboðað flokkin, men hann stillar ikki upp hesaferð.

Nýggja valevni úr Skopun hesaferð er Gerhard Lognberg, sum eisini er bygdarráðsformaður í Skopun.

# Javnaðarlistin í Norðoyggjum

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Javnaðarflokkurin í Norðoyggjum er liðugur við listan til løgtingsvalið komandi. Flokkurin stillar upp sjey valevni, og tey eru:

Kaj Boetius
Vilhelm Johannesen
Tórleif Sigurðsson
Jógvan Páll Poulsen
Jákup á Fløtti Jacobsen
Leif Waag Høgnesen
Mamy Dahl Sørensen

Vilhelm Johannesen hevur umboðað Norðoyggjar á tingi síðani 1980. Hann gjørdist landsstýrismaður í 1979 og varð valdur á ting í 1980. Poul Jacob Olsen umboðaði flokkin í Norðoyggjum øll árini frá 1958 til 1980.

Mamy Dahl Sørensen hevur verið valevni síðani 1988, og hevur hon verið nummar tvey á listanum við øll valini síðani, og hevur hon fleiri ferðir havt sæti á tingi.

Tórleif Sigurðsson, sum eisini er á listanum, hevur seinastu árini verið býráðslimur í Klaksvík. Eisini hann hevur onkuntíð havt sæti á tingi seinasta valskeiðið.

# Grækarismessuhald í Havn

GRÆKARISMESSA

Í morign, sunnudagin 10. mars kl. 15.00, verður Grækarismessuhald á Vaglinum í Havn.

Skótarnir ganga skrúðgongu og Havnar hornorkestur spælir.

Ditlev Róin úr Fuglafirði flytur fram røðu.

Fyrsta Grækarismessan var hildin í 1943, og var tað Sverri Patursson sum heitti á skótarnar um at halda henda dagin.

Allir skótar í Havnini skulu møta ein tíma áðrenn í skótahølum sínum.

Skrúðgongan ferð frá Vágsbotni kl.14.45.

Gingið verður eftir Bøgøtu-Tróndargøtu-Niels Finsensgøta-oman á Vagli.

# Páskastevna á Hálsi



*Ítróttarhøllin á Hálsi verður aftur í ár karmur um Páskastevnuna hjá Meinigheitini í Hoyvík*

**Stevnan verður í ítróttarhøllini á Hálsi frá 28. mars til 1. apríl**

PÁSKASTEVNA
*Tíðindaskriv*

Eins og undanfarin ár skipar Meinigheitin í Hoyvík fyri stórari páskastevnu í Havn. Hesa ferð verður páskastevnan í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Stevnan verður sett skíriskvøld kl. 19, og hildið verður so fram við møtum alla høgtíðina líka til 2. páskakvøld, tá seinasta møtið verður hildið kl. 18.

Umframt kvøldmøtini verða eisini onnur møti. Allar heiligdagarnar á páskum er morgunmøti og langafríggjadag verður eisini eitt møti seinnapartin.

Av serligum tiltøkum á stevnuni skulu vit nevna: Familjumøtið, ið verður páskadag kl. 15, ungdómstiltakið við lovsongsløtu páskaaftan kl. 22 og gospeltiltakið páskakvøld kl. 22.

Sum vanligt hevur verið fáa vit eisini hesaferð vitjan uttanífrá. Tað verða Gordon Hickson og Ole Henry Halleraker, ið verða høvuðstalarar.

Gordon Hickson er kendur frá páskastevnunum í 1999 á Skála og frá páskastevnuni í 2000 í Havn. Hann kemur frá Watford i Onglandi og hevur áður verið við til at fyriskipa og tikið lut í fleiri møtirøðum runt umkring í heiminuml, og her skulu serliga nevnast møtirøðirnar í Afrika saman við kenda týska trúboðaranum Reinhard Bonnke. Gordon hevur eitt serligt kall til at náa ungdómin og hevur hann eisini víst serligt hegni í hesum arbeiði. Spennandi verður at hoyra tað, Harrin hevur lagt honum á hjartað í ár.

Ole Henry Halleraker er norðmaður og er ein av teimum trimum fyristøðumonnunum í "Kristkirken" í Bergen. Eisini er hann rektari á bíbliuskúlanum "Veien" í Bergen. Hann er kendur sum frálíkur talari og ikki minst fyri sína sterku profetisku tænastu. Hann hevur mangan verið til møtirøðir ymsastaðni í Svøríki, og har hevur hann verið sera væl móttikin.

Bæði Gordon Hickson og Ole Henry Halleraker eru kendir fyri at ganga á odda fyri at sameina "Guðs fólk", og hava teir stak góðar royndir í hesum arbeiði bæði frá Watford og frá Bergen. Eisini í hesum sambandi hava vit ætlanir um at samla leiðarar frá ymsum samkomum fyri at gera nýtslu av teirra góðu evnum og royndum.

Páskastevnan plagar at verða væl vitjað, og eisini hesaferð er stevnan løgd fyri Harran Jesus í ákallan og bøn við tøkk. So tá ið Meinigheitin í Hoyvík í treysti og við frímóði hevur bjóðað seg fram at skipa fyri hesum tiltakinum á páskum, so er tað tí vit vita, at Harrin hoyrir bønir. Vit biðja um, at stevnan má verða til ríkt vælsignilsi fyri mong, og at Harrin Jesus fer at loysa og seta mong menniskju í fullkomið frælsi.

Verið øll Hjartaliga vælkomin á páskastevnu.

# Ásmund og Rigmor gullbrúdleyp



Í gjár, 8. mars, kundu hjúnini Rigmor og Ásmund í Norðragøtu, halda gullbrúdleyp. Ringmor er donsk og kemur úr Ringsted. Hon er útbúgvin sjúkrasystir og kom saman við eini vinkonu til Føroya at arbeiða á Dronning Alexandrinas Hospital.

Ta tíðina, hon var í Føroyum, kom hon at kenna Ásmund, og gingu tey í hjúnarlag fyri fimmti árum síðan.

Ásmundur er næstur av einum sysknaflokki upp á 13 syskin, sonur Thomas Jacob Thomsen úr Blásastovu í Norðragøtu og Magdalenu Gregersen úr Syðrugøtu.

Tey høvdu handils- og reiðaravirksemi í Norðragøtu.

Ásmundur hevur tikið útbúgving á Landsbrúksskúla í Hvannoyri, Íslandi og síðan útbúgving sum konstruktørur, har hann arbeiddi hjá deildini hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði til hann fór frá 70 ára gamal.

Rigmor hevur røkt starvið sum økissjúkrasystir í Gøtu, og har um leiðir til hon fór frá fyri aldur.

Ásmundur tekst m. a. við at skriva, og kennast fleiri við hansara meiningar um eldrapolitikk í blaðgreinum

Rigmor er somleiðis aktiv á eldrarøkinum og skipar fyri m. a. fyri áhugtiltøkum millum eldri. Ein kend bygdamynd!



Tunnilslóg:

# Fyribilsuppskot skal fyribilssamtykkjast




**Ákoyringarnar frá andstøðuni vóru harðar, tá uppskotið um at fara undir at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy var fyri á tingi hóskvøldið. Løgmaður viðgekk, at uppskotið ikki er fullfíggjað, og boðaði frá, at eitt uppskot um broyting av framlagda uppskoti, var í væntu eftir ólavsøku.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*

Uppskotið um at geva P/F Leirvíkstunnlinum loyvi til at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy fekk harða viðferð av andstøðuni, tá tað var til fyrstu viðgerð í tinginum hóskvøldið.

Og tað var eisini eitt løgið uppskot, ið løgmaður sjálvur legði fram, av tí at Bjarni Djurholm í farnu viku noktaði at seta sítt navn undir. Tað viðgekk løgmaður frá tingsins røðarapalli, eftir at framsøgumenninir hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum høvdu givið honum nakrar skortfleingjur.

Anfinn Kallsberg, løgmaður viðurkendi undir kjakinum, at uppskotið átti at verið meira gjøgnumarbeitt, men segði seg ikki vilja nokta fyri at leggja tað fram, tá hann fekk áheitan um hetta frá ávikavist Karsteni Hansen, landsstýrismanni, og Rúnu Sivertssen, tingkvinnu.

- Hevði eg noktað at lagt uppskotið fram hevði tað bara ført til spekulatiónir um hvørjar baktankar løgmaður hevði við hesum. Tá er betri at leggja uppsotið fram nú og so rætta tað til seinni, segði Anfinn Kallsberg, sum soleiðis ikki kávaði útyvir, at valið stóð millum ilt og verri.

## Til lítlan sóma

Jóannes Eidesgaard, ið var framsøgumaður fyri Javnaðarflokkin í málinum, helt tað vera til lítlan sóma fyri Føroya Løgting, at uppskotið varð borið í tingið hálvliðugt. Hann vísti á, at tað sjáldan hevur verið so stór semja millum flokkarnar á tingi, sum tað nú er um at gera tunnilin millum Eysturoy og Borðoy, og at tað tí ikki átti at verið neyðugt at skundað uppskotið ígjøgnum áðrenn valið.

– Eg kann ikki koma til aðra niðurstøðu enn at hetta má vera valflesk, segði Jóannes Eidesgaard, ið var fyrsti framsøgumaður.

Alfred Olsen, framsøgumaður fyri hin stóra andstøðuflokkin, Sambandsflokkin, og limur í vinnunevndini, ið skal viðgera uppskotið, átalaði, at samgongan legði eitt so ófullfíggjað uppskot fyri tingið og segði málið vera vónleyst at avgreiða.

Alfred Olsen vísti á, at tá tilsvarandi uppskot varð lagt fram um Vágatunnilin tók tað tveir mánaðir at avgreiða. Uppskotið um tunnilin millum Eysturoy og Borðoy skal avgreiðast innan mánadagin.

## Níggju linjuføringar

Uppskotið til løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, ið var til fyrstu viðgerð hóskvøldið, gevur nýstovnaða P/F Leirvíkstunnilinum heimild at fara undir arbeiðið at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy og vegakervi frá báðum tunnilsmunnum. Harafturat ásetur uppskotið játtan, eigaraviðurskiffti og annað.

Orsøkin til at uppskotið verður kallað hálvliðugt er, at einki verður ásett í uppskotinum um hvønn veg tunnilin skal spreingjast og hvar vegasambandið til tunnilin skal ganga. Tað eydnaðist nevniliga ikki at fáa hesar fyrireikingar lidnar áðrenn freistin at lata mál inn til tingið var úti hósdagin í farnu viku. Av tí sama hava tingmenn onga fasta kostnaðarmeting at halda seg til.

Ístaðin fingu tingmenn eitt kort at síggja, har níggju ymiskar sokallaður linjuføringar, tað vil siga tunnilsleiðir, vóru uppteknaðar, men einki varð greitt frá um vegagerð.

## Samtykkja nú forsegla seinni

Í uppskotinum verður ásett, at landsstýrið skal góðkenna endaligu tunnilsverkætlanina áðrenn arbeiðið verður sett í gongd, og tað hildu summir tingmenn vera at geva avvarandi landsstýrismanni í so stórt rásarúm.

Jóannes Eidesgaard samanbar støðuna við at tingið skuldi samtykt at bygt eina nýggja Suðuroyarferju, men ikki ásett hvussu nógv hon skuldi kosta ella hvussu stór hon skuldi vera, og hann kallaði gongdina í málinum fyri ábyrgdarleysan politik.

Bæði framsøgumaðurin hjá Javnaðarflokkinum og hjá Sambandsflokkinum løgdu tó stóran dent á, at teir tóku fult undir við at tunnil eigur at vera gjørdur undir Leirvíksfjørð sum skjótast.

Løgmaður heitti undir fyrstu viðgerð av uppskotinum á tingmenn um at samtykkja uppskotið í fyrstu atløgu í hesi tingsetu, og so forsegla tað, sum hann málbar seg, við einum broytingaruppskoti eftir ólavsøku, tá næsta tingseta byrjar.

Sum tað ljóðaði á framsøgumonnunum fyri samgonguflokkarnar verður hendan áheitan uttan iva fylgd.

# Havtaska við svørtum royggi

FISKIRANNSÓKNIR
*Tíðindaskriv*

Í februar í ár fekk Magnus Heinason eina havtasku av slagnum Lophius budgassa á Skeivabanka, og er hetta fyrstu ferð at Fiskirannsóknarstovan veit um, at hon er veidd undir Føroyum.

Sunnanfyri, t.e. í Norðsjónum, vestan fyri Bretsku oyggjarnar og í Biskaya víkini, er hon tó vanlig og verður har fiskað saman við vanliga slagnum vit kenna (Lophius piscatorius). Sløgini líkjast heilt nógv og kennast best frá hvørjum øðrum við, at L. budgassa hevur svart roygg og L. piscatorius klárt roygg.

Fiskirannsóknarstovan er í gongd við at kanna almennu lívfrøðina hjá havtasku undir Føroyum, og í kanningini er alneyðugt at vita, um fiskiskapurin bert er eftir einum slag, ella um talan er um tvinni sløg.

Av tí, at sløgini eru so meinlík, er hugsandi, at menn ikki geva sær far um munin í litinum á roygginum. Um so er, kann ein partur av veiðuni hava verið L. budgassa, men skrásett sum vanlig havtaska, uttan at nakar hevur gáað um tað.

Fyri at fáa meiri vitan um hetta, verður við hesum heitt á fólk, sum dagliga fáast við havtasku, bæði á sjógvi og landi, um at hyggja at litinum á roygginum. Fólk verða biðin um at boða okkum frá, um tey fáa havtasku við svørtum royggi, og í fall eisini hvussu nógvar.

Vitan um longd (longstu longd í cm) og staðfesting av, hvar havtaskan var fiskað (longd og breidd), er eisini sera vælkomið.



*Á myndini er víst vanlig havtaska (í erva) og havtaska við svørtum royggi (í neðra)*